# ÁRSFRÁGREIÐING

## KRABBAMEINSFELAGIÐ 2023

krabbameinsfelagið

**Krabbameinsfelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo

**Starvsfólk**
Dagligur leiðari: Jansy Gaardlykke
Ráðg. sjúkrarøktarfrøðingur: Anna Kristina Joensen
Skrivstova: Poula Norðbúð

**Nevndin í Krabbameinsfelagnum**
Formaður: Durita Tausen
Næstformaður: Magnus Magnussen
Kassameistari: Anna Kristina Joensen
Nevndarlimur: Olga Kristina Hansen
Nevndarlimur: Marnar Fríheim Kristiansen

Tiltakslimur: Martin Joensen
Tiltakslimur: Elmar Ósá

**Hjálpargrunnurin**
Durita Tausen
Olga Kristina Hansen
Jónvør Christiansen

**Team Rynkeby Føroyar**
Elmar Ósá
Olga Kristina Hansen
Durita Tausen

# Indhold

FORORÐ ..... 1
KRABBAMEINSFELAG Í 45 ÁR ..... 2
HJÁLP OG RÁÐGEVANDI ARBEIÐI ..... 2
BØRN OG SORG ..... 2
KRABBAMEIN Í TØLUM ..... 3
FLEIRI FÁA KRABBAMEIN ..... 3
Í FØROYUM KOMA FÆRRI UNDAN ..... 4
NORÐURLENDSK KRABBAMEINSHAGTØL ..... 6
ÁHEITANIR Á POLITIKARAR OG MYNDUGLEIKAR ..... 6
TAÐ GONGUR OV SEINT AT SETA TILMÆLINI Í VERK ..... 6
FUNDIR VIÐ LANDSSTÝRISFÓLK ..... 7
NEYÐUGT VIÐ NÝGGJARI ÁVÍSINGAR- OG ÚTGREININGARSKIPAN ..... 7
TESLA-SKANNARIN ER EITT STÓRT FRAMSTIG ..... 8
NÝGGJUR CT-SKANNARI ..... 8
GRANSKING ..... 9
DRÚGT HJÁ MONNUM AT FÁA STAÐFEST LUNGNAKRABBA ..... 9
UMRÁÐANDI AT KANNA FYRI LÍVMÓÐURHÁLSKRABBA ..... 9
GÓÐ UNDIRTØKA FYRI HPV-KOPPSETING ..... 10
AÐALFUNDUR ..... 10
EITT VIRKIÐ ÁR ..... 10
SAMRØÐUBÓLKAR ..... 10
SKEIÐ Í HÚÐRØKT OG MAKEUP ..... 11
VITAN UM BRÓSTKRABBA ..... 11
HUGNALØTUR ..... 11
TILTØK UM PROSTATAKRABBA ..... 11
GONGUTÚRUR ..... 11
STERKARI VIÐ RØRSLU ..... 12
HUGNI Á TVØROYRI ..... 12
TEMADAGUR FYRI SJÁLVBOÐIN ..... 12
BØKUR ..... 12
INNSAVNING ..... 12
GRANNAKAFFI ..... 13
LJÓSAREYÐUR OKTOBER ..... 13
FØROYA VAKRASTA 1/2 MARATON ..... 13
SPYR.FO ..... 13
TEAM RYNKEBY FØROYAR GRUNNURIN ..... 13

# FORORÐ

45 ár.  Besti aldur vilja nógv vera við. Tað eru eisini árini, sum Krabbameinsfelagið hevur á baki. So nógv ár eru tað, síðan Sanna Dahl, maðurin Bjarni Niclasen og Lions feløgini í Føroyum stovnaðu Krabbameinsfelagið. Øll vit, sum hava merkt sjúkuna á egnum kroppi ella eiga onkran, sum hevur verið ella er sjúkur, hava nógv at takka teimum fyri – at tey tóku hetta stigið. Tí gleðast vit í felagnum eisini um, at í 2023 kom ævisøgan um megnarkvinnuna Sannu Dahl. Vit eru takksom, at feðgarnir Martin og Flóvin Þór Nygaard Næs hava latið hesa bók úr hondum.

Arbeiðið, sum tey løgdu lunnarnar undir, hevur hildið á øll hesi 45 árini. Øll hesi 45 árini hava tit – fyritøkur, feløg, einstaklingar og sjálvboðin – stuðlað Krabbameinsfelagnum. Tað ger, at tað hevur borið til og ber til hjá okkum at hjálpa og umboða tey, sum fáa krabbamein, og tey, sum varða av.

Sanna og Bjarni funnu eisini upp á búmerkið, sum er ein held. Búmerkið er ímyndin av, at Krabbameinsfelagið vil gera sítt til, at tunga byrðan verður lættari at bera.

---

Vit gleðast eisini um, at stig eru tikin til at fáa tveir nýggjar skannarar. Ein CT-skannara, sum verður á Landssjúkrahúsinum, og ein 3-Tesla MR-skannara, sum verður á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Tað er ordiliga gott. Góð amboð eru stórt stig í arbeiðinum at fáa staðfest krabbamein so skjótt og væl sum til ber.  At fáa hesar skannararnar er eisini millum tilmælini, sum standa í Krabbameinsætlanini.

---

Í Føroyum er krabbamein tann sjúkan, sum krevur flest mannalív. Tíbetur eru nógv, sum fáa heilsubót. Tíverri eru vit eftirbátar í Norðurlondum, tá ið hugt verður at, hvussu nógv liva fimm ár eftir, at sjúkan varð staðfest. Tað verður nokk so nógv gjørt burtur úr akkurát hesum í krabbameinsætlanini.

Í Krabbameinsfelagnum halda vit, at tað sigur seg sjálvt, at tað hevur størstan skund at fáa vent hesum. At  tilmælini í krabbameinsætlanini mugu verða sett í verk, soleiðis at krabbameinsøkið verður betur skipað og lyft á sama stig, sum í hinum Norðurlondunum. Soleiðis at so nógv lív, sum til ber, verða bjargað.

Tilmæli eftir tilmæli verða gjørd. Millum annað eru tilmæli skrivað um palliatión, um viðgerðartrygd og um ársskiftið fekk landsstýriskvinnan í heilsumálum tilmæli um ávísingar- og útgreiningarskipan fyri krabbamein.

Í tilmælinum um ávísingar- og útgreiningarskipan verður millum annað víst á, at

- eingin **áseting** er um, hvussu skjótt sjúklingar skulu fáa tilboð um at verða útgreinaðir og fáa viðgerð
- eingin neyv **skráseting** er av, hvussu skjótt sjúklingar verða útgreinaðir og fáa viðgerð

Niðurstøðan hjá teimum, sum hava skrivað tilmælið, er:

- Viðurskiftini í Føroyum eru als ikki skipað í hvørki lóg ella praksis

Hetta er álvarsamt, fyri ikki at siga ræðandi.

Skal eg vera hampilig, so kann eg siga, at lítið hoyrist frá teimum, sum hava størsta valdið at gera nakað við hetta. Skal eg vera erlig, so má eg siga, at einki hoyrist frá teimum, sum hava størsta valdið at gera nakað við hetta.

Komið nú! – *Durita Tausen, forkvinna*

## KRABBAMEINSFELAG Í 45 ÁR

Krabbameinsfelagið hevði 17. januar í ár 45 ár á baki og er størsta sjúklingafelagið í Føroyum. Øll árini hevur felagið virkað við kjarnauppgávuni at upplýsa um krabbamein, bøta um korini hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarðandi, umframt at stuðla gransking viðvíkjandi krabbameini. Krabbameinsfelagið er óheftur felagsskapur, og ein 5-mannanevnd stýrir felagnum.

### HJÁLP OG RÁÐGEVANDI ARBEIÐI

Á skrivstovuni starvast trý fólk – tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar og eitt skrivstovufólk. Starvsfólkini svara spurningum og ráðgeva teimum mongu, sum dagliga seta seg í samband við Krabbameinsfelagið. Tey hava samrøðubólkar og samrøður við sjúklingar, avvarðandi og fólk, sum hava verið sjúk av krabbameini. Felagið kunnar, hjálpir og stuðlar bæði undir og eftir sjúku. Eisini teimum, sum hava mist. Hetta verður raðfest høgt, tí ongi skulu standa einsamøll.

Eisini hevur Krabbameinsfelagið bæði tilboð og tænastur, sum kunnu hjálpa tí sjúka og teimum avvarðandi. Vitjað verður á sjúkrahúsum, stovnum, skúlum og fyritøkum fyri at veita hjálp, ráðgeving og at kunna um Krabbameinsfelagið. Felagið luttekur í arbeiðsbólkum og nevndum, sum hava til endamáls at bøta um umstøðurnar hjá krabbameinssjúklingum og bøta um útgreining og viðgerð. Eisini arbeiðir felagið áhaldandi við at ávirka myndugleikarnar at gera batar á krabbameinsøkinum.

Umframt starvsfólkini á skrivstovuni eru fleiri sjálvboðin, sum skipa fyri tiltøkum og hjálpa til, tá ið felagið skipar fyri stórum tiltøkum. Virksemið hjá Krabbameinsfelagnum er fíggjað við limagjøldum, gávum og innsavningum. Uttan henda stuðulin bar snøgt sagt ikki til at reka felagið.

## BØRN OG SORG

Ein stórur partur av virksemi og ráðgevandi arbeiði hjá Krabbameinsfelagnum í fjør hevur snúð seg um børn og sorg. Hvørt ár uppliva fleiri børn, at foreldur, systkin ella aðrir næstringar gerast álvarsliga sjúk ella doyggja. Hetta hevur við sær nógvan ótta og ótryggleika hjá teimum avvarðandi, eisini børnunum. Tí er tað týðandi, at tey fáa so góða hjálp sum til ber, og at tey verða loftað.

Familjusjónarhornið er høgt raðfest í arbeiðinum, og Krabbameinsfelagið arbeiðir støðugt fyri, at børn sum avvarðandi skulu fáa ta hjálp, teimum tørvar. Í 2022 gjørdi felagið nógv burtur úr kunning, skeiðum, fyrilestrum og ráðstevnu um børn og sorg.

Eftir hetta settu nógv seg í samband við felagið fyri at fáa vegleiðing um, hvussu tey á besta hátt hjálpa børnunum. Hetta eru bæði foreldur, skúlar og stovnar. Í tí sambandi hevur Krabbameinsfelagið verið úti á fleiri skúlum og stovnum at kunna um arbeiðið og veita starvsfólkunum vegleiðing í at vera um børnini. Eisini hava vit havt fleiri foreldra- og familjusamrøður, umframt samrøður við børn og ung.

# KRABBAMEIN Í TØLUM

## FLEIRI FÁA KRABBAMEIN

Seinastu árini er tað sum heild fleiri og fleiri føroyingar, sum fáa staðfest krabbamein. Í miðal hava út ímóti 250 fólk árliga fingið staðfest krabbamein árini frá 2012-2021. Fram til 2009 vóru færri enn 200 nýggir krabbameinstilburðir árliga, men síðan 2009 hava tilburðirnir hvørt ár ligið oman fyri hetta tal.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 130 | 135 | 134 | 133 | 173 | 165 | 170 | 194 | 187 | 230 | 249 | 218 | 228 | 242 | 204 | 266 | 232 | 271 | 258 | 243 | 237 | 252 |

Í 2021 vóru 252 nýggir krabbameinstilburðir staðfestir í Føroyum – 124 menn og 128 kvinnur. Býtið millum menn og kvinnur hevur ikki altíð verið so javnt. Flestu árini síðan 2006 hava fleiri menn enn kvinnur fingið staðfest krabbamein. Hagtølini vísa eisini, at í Føroyum doyggja fleiri menn enn kvinnur av krabbameini.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Krabbameinstilburðir, menn | 52 | 53 | 67 | 68 | 85 | 58 | 93 | 118 | 106 | 123 | 131 | 118 | 147 | 134 | 102 | 151 | 111 | 154 | 139 | 136 | 114 | 124 |
| Krabbameinstilburðir, kvinnur | 78 | 82 | 67 | 65 | 88 | 107 | 77 | 76 | 81 | 107 | 118 | 100 | 81 | 108 | 102 | 115 | 121 | 117 | 119 | 107 | 123 | 128 |
| Deyðstilburðir, menn | 42 | 52 | 51 | 40 | 50 | 60 | 63 | 52 | 61 | 48 | 65 | 66 | 55 | 64 | 48 | 57 | 48 | 68 | 65 | 60 | 63 | 53 |
| Deyðstilburðir, kvinnur | 42 | 42 | 49 | 50 | 46 | 62 | 33 | 36 | 42 | 48 | 35 | 61 | 42 | 34 | 47 | 44 | 55 | 54 | 38 | 42 | 32 | 51 |

Hyggja vit at árunum 2019-2021, eru vanligastu sløgini av krabbameini í Føroyum í tjúktarmi/endatarmi, brósti, prostata og lunga. Hetta vóru eisini vanligastu krabbameinssløgini í

2007-2009. Munurin er tó, at tað eru færri tilburðir av prostatakrabba, meðan hini trý sløgini eru økt.




## Í FØROYUM KOMA FÆRRI UNDAN

Hyggja vit at, hvussu nógv koma undan við lívinum, eru bæði góð og ring tíðindi. Góðu tíðindini eru, at seinastu árini eru munandi fleiri komin undan við lívinum í Føroyum og í Norðurlondum sum heild. Men tíverri er tað eisini soleiðis, at í Føroyum koma lutfalsliga færri undan við lívinum enn í hinum Norðurlondunum, tá ið øll krabbameinssløg verða løgd saman.






Døpru hagtølini vórðu eisini staðfest í grein, sum tíðliga í 2023 varð útgivin í International Journal of Cancer, og sum elvdi til umrøðu av, hví føroyska krabbameinsøkið klárar seg verri enn í grannalondunum.

Heitið á greinini er ”Cancer survival in the Faroe Islands over the last 50 years compared to the other Nordic countries”. Høvundarnir eru Marnar Fríðheim Kristiansen, Ronja Midjord Mikkelsen, Tordis Kristiansdóttir, Guðrið Andórsdóttir, Sæunn Ólavsdóttir Hansen, Bjarni á Steig, Kári Rubek Nielsen, Maria Skaalum Petersen og Marin Strøm.

Greinin er bygd á eina granskingarverkætlan um krabbamein í Føroyum, sum Marnar Fríðheim Kristiansen hevur gjørt, og sum m.a. Krabbameinsfelagið hevur verið við til at stuðla fíggjarliga.

Í greinini verður hugt at, hvussu nógvir føroyskir krabbameinssjúklingar eru komnir undan við lívinum, og Føroyar verða bornar saman við hini Norðurlondini seinastu 50 árini. Hugt verður at, hvussu nógv liva ávikavist eitt og fimm ár eftir at sjúkan er staðfest. Tølini úr NORDCAN-samstarvinum verða nýtt, tí hesi verða gjørd upp eins í øllum Norðurlondum.

Taka vit øll krabbameinssløg undir einum, doyggja fleiri menn og kvinnur í Føroyum av sjúkuni enn í hinum Norðurlondunum. Tølini vóru serliga lág fyri, hvussu nógvar føroyskar kvinnur við krabba í eggrótini og føroyskir menn við lungnakrabba livdu fimm ár eftir, at sjúkan varð staðfest. Tølini fyri kvinnur við bróstkrabba og menn við bløðrukrabba vóru lág nøkur av fyrru tíðarskeiðunum, men eru nú á sama stigi sum í hinum Norðurlondunum.

Granskararnir mæla til, at neyvar kanningar verða gjørdar fyri at kanna, hví føroyskir sjúklingar liva styttri.

Greinin sæst her.

Ein av høvundunum er Marnar Fríðheim Kristiansen, lækni og granskari. Í samrøðu við KvF 16. februar mælti hann til at kanna tølini gjøllari og seta átøk í Krabbameinsætlanini í verk, m.a. átøk sum skulu tryggja skjóta leið frá ávísing til viðgerð.

Samrøðan kann hoyrast her.

### NORÐURLENDSK KRABBAMEINSHAGTØL

Vilt tú vita, hvussu krabbameinstølini í Føroyum síggja út sammett við Norðurlondini, ber til at finna nógv tilfar í dátugrunninum hjá NORDCAN-samstarvinum.

NORDCAN er ein dátugrunnur við hagtølum um krabbamein í Føroyum, Danmark, Finnlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Grønlandi. Tølini fata um nýggjar tilburðir, hvussu nógv koma undan, deyðatíttleika, og hvussu nógv liva við krabbameini. Til ber at finna tøl fyri yvir 50 sløg av krabbameini. Elstu tølini hjá NORDCAN røkka heilt aftur til 1943, tá ið fyrsta krabbameinsskrásetingin varð gjørd í Danmark.

Leinkja til NORDCAN er her.

## ÁHEITANIR Á POLITIKARAR OG MYNDUGLEIKAR

### TAÐ GONGUR OV SEINT AT SETA TILMÆLINI Í VERK



Krabbameinsfelagið hevur fleiri ferðir í farna ári heitt á politiska myndugleikan um at seta ferð á arbeiðið at útinna tilmælini í Krabbameinsætlanini, sum kom í apríl í 2022. Felagið hevur eitt nú gjørt vart við hetta í miðlunum, á fundum við landsstýrisfólk og á heimasíðuni hjá felagnum.

Í grein í mai heitti forkvinnan í Krabbameinsfelagnum, Durita Tausen, á politisku skipanina um at seta tilmælini í verk. Hon vísti á, at vit onga lóg hava um viðgerðartrygd og mest loyvdu bíðitíð. Heldur ikki hava vit hagtøl fyri, hvussu leingi tað tekur at staðfesta illgruna um krabbamein og at fáa viðgerð.

Tørvur er á at lyfta krabbameinsøkið upp á sama stig sum í hinum Norðurlondunum. Í Føroyum er krabbamein tann sjúkan, sum krevur flest mannalív. Nógv fáa heilsubót, men vit eru tíverri eftirbátar í Norðurlondum viðvíkjandi, hvussu nógv liva fimm ár eftir, at sjúkan er staðfest. Tí hevur tað skund at seta tilmælini í Krabbameinsætlanini í verk, soleiðis at krabbameinsøkið verður betur skipað og lyft upp á sama stig sum í hinum Norðurlondunum.

Forkvinnan vísti á nøkur av mongu tilmælunum í Krabbameinsætlanini. Eitt nú at orða menningarætlan fyri kommunulæknaskipanina, gera eina einfalda og gjøgnumskygda ávísingarskipan og at lógaráseta mest loyvdu bíðitíð til útgreining og viðgerð. Eisini skulu bíðitíðir skrásetast og almannakunngerast nakrar ferðir um árið.

Greinin hjá forkvinnuni kann lesast her.

Eftir greinina setti Kringvarpið sjóneykuna á krabbameinsøkið, millum annað í Breddanum 6. juni. Har greiddi forkvinnan í Krabbameinsfelagnum frá, at tíðin er størsti fíggindin hjá krabbameinssjúklingum. Tí er umráðandi at áseta mest loyvdu bíðitíðir til útgreining og viðgerð,

soleiðis at føroyskir krabbameinssjúklingar fáa somu treytir sum í grannalondunum. Tað er syrgiligt, at tað gongur so seint at seta tilmælini í Krabbameinsætlanini í verk, tí hetta snýr seg jú um lív, segði hon.

Sendingin kann hoyrast her.

## FUNDIR VIÐ LANDSSTÝRISFÓLK

Krabbamein er ein sjúka, sum rakar flestu føroysku familjur og hevur stóra ávirkan á lívið hjá teimum, sum rakt verða. Tí er umráðandi, at landsins politikarar eru kunnaðir um krabbameinsøkið í Føroyum og viðurskifti hjá krabbameinssjúklingum.

Krabbameinsfelagið hevur í 2023 havt fundir við fleiri av landsstýrisfólkunum at kunna um virksemi felagsins og tosa um Krabbameinsætlanina. Í mars var fundur við Margit Stórá, landsstýriskvinnu í heilsumálum, og í apríl við Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum.



Nógv virksemi hjá Krabbameinsfelagnum fatar um børn og ung. Í juni var fundur við landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen.

Umboðini fyri Krabbameinsfelagið greiddu frá virksemi felagsins, ið fatar um børn og ung, og tosað varð um tilmælini í Krabbameinsætlanini. Eitt nú tilmælið at lógarfesta skipaða hjálp til børn og ung sum avvarðandi, og tilmælið um at allir skúlar og stovnar skulu hava eina sorgartilbúgvingarætlan, tá ið álvarslig sjúka ella deyði rakar familjuna. Landsstýrismaðurin segði, at hesi viðurskifti verða tikin við í Barnaverkætlanina, sum arbeitt verður við í løtuni.

## NEYÐUGT VIÐ NÝGGJARI ÁVÍSINGAR- OG ÚTGREININGARSKIPAN

Føroyskir sjúklingar mugu hava lógartryggjaðan rætt til skjóta útgreining og viðgerð fyri krabbamein. Ein lóg skal gerast, sum setir hámark fyri mest loyvdu bíðitíðir.

Tað er høvuðsniðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, sum í desember handaði landsstýriskvinnuni í heilsumálum tilmæli um ávísingar- og útgreiningarskipan fyri krabbamein. Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari hjá Krabbameinsfelagnum, umboðaði felagið í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at Føroyar eru eftirbátur, tá ið tað kemur til at tryggja sjúklingum skjóta útgreining og viðgerð fyri krabbamein. Millum annað vísa hagtøl, at føroyski krabbameinssjúklingar liva styttri enn krabbameinssjúklingar í hinum Norðurlondunum.

Sum er, er ongin áseting í føroyska heilsuverkinum um, hvussu skjótt sjúklingar skulu fáa tilboð um útgreining og viðgerð fyri krabba. Heldur ikki er nøkur neyv skráseting av bíðitíð til útgreining og viðgerð í Føroyum. Vandi er eisini fyri, at ávísingar enda á skeivum stað ella verða “burtur” í mongdini, tí krabbameinsávísingarnar fara sama stað sum allar aðrar ávísingar til serøkini ella eindirnar í Heilsuverkinum.

Millum tilmælini hjá arbeiðsbólkinum kunnu nevnast:

- Politiska skipanin skal gera lógarásettar reglur um hámark fyri bíðitíðir til útgreining og viðgerð fyri krabbamein
- Bíðitíðirnar skulu vera líkar teimum donsku, og vit skulu sum heild fylgja pakkunum hjá danska Sundhedsstyrelsen
- Ein nýggj móttøkueind skal gerast í Cosmic, sum verður kallað Krabbaútgreiningareindin. Allar nýggjar ávísingar, sum fata um krabbamein, skulu sendast til hesa eindina
- Fleiri serøki, sum eru avgerandi fyri at útgreina krabbamein, t.d. patologi, endoskopi og røntgen, mugu verða uppraðfest

Arbeiðsbólkurin mælir til, at ein eftirlitsmyndugleiki regluliga kannar, um Heilsuverkið heldur ásettu bíðitíðirnar, og at ein árlig frágreiðing verður gjørd við hagtølum yvir bíðitíðir.

Tilmælið kann lesast her.

## TESLA-SKANNARIN ER EITT STÓRT FRAMSTIG

Eitt av teimum 69 tilmælunum í Krabbameinsætlanini er, at nýggjur MR-skannari verður keyptur skjótast til ber. Í fjør komu boðini um, at privatir gevarar lata sjúkrahúsverkinum ein 3-Tesla MR-skannara. Hetta fegnast Krabbameinsfelagið um og hevur greitt alment frá, hví hetta er ein kærkomin gáva.



Skannarin kemur væl við at útgreina krabbamein, serliga har illgruni er um prostatakrabba og arvaligan bróstkrabba. Tað er lættari fyri sjúklingin at verða skannaður enn at taka vevnaðarroyndir, og úrslitið er eisini neyvari. Ein vevnaðarroynd fyri prostata kann bara siga, um krabbi er í júst hesari royndini. Vísir vevnaðarroyndin ongan krabba, kann krabbi tó vera aðrastaðni í prostatakertlinum.

Við 3-Tesla MR-skannaranum er myndin so neyv, at allur prostatakertilin verður kannaður. Umleið 50-70% av teimum monnum, har illgruni er um sjúkuna, sleppa undan at taka vevnaðarroyndir. Kanningar við skannaranum eru so statt bæði neyvari, skjótari og lættari fyri sjúklingin.

## NÝGGJUR CT-SKANNARI

Krabbameinsfelagið fegnast eisini um nýggja CT-skannaran, sum Landssjúkrahúsið herfyri fekk. Í Krabbameinsætlanini verður nevniliga mælt til at útvega nýggjan CT-skannara, soleiðis at Landssjúkrahúsið hevur tveir.

Tørvurin á CT-skanningum veksur ár um ár, og umráðandi er, at tað altíð er pláss í CT-skannaranum til t.d. at útgreina krabbameinssjúklingar, og eisini um hin skannarin gerst óvæntað óvirkin ella skal til regluligt eftirlit.

Nýggi skannarin arbeiðir skjótari enn tann gamli, og myndirnar eru munandi betri. Mett verður, at næsti skannari eigur at verða keyptur í 2027, og so eiga teir at verða skiftir, so hvørt teir gerast á leið tíggju ára gamlir.

## GRANSKING

### DRÚGT HJÁ MONNUM AT FÁA STAÐFEST LUNGNAKRABBA

Eitt av aðalmálunum hjá Krabbameinsfelagnum er at veita stuðul til at granska krabbamein. Felagið hevur stuðlað fleiri granskingarverkætlanum gjøgnum árini. Í 2023 var ein verkætlan viðvíkjandi lungnakrabba liðug, sum Krabbameinsfelagið hevur stuðlað við 90.000 kr.

Kanningin vísir, at í Føroyum er tað drúgvari hjá monnum enn hjá kvinnum at fáa staðfest lungnakrabba og verða settir í viðgerð. Lungnakrabbin hjá monnum er ofta á hægri stigi (meira framkomin) enn hjá kvinnum, tá ið sjúkan verður staðfest.

Annika Haraldsen Lindenskov og Halla Potts hava gjørt granskingarverkætlanina, ið hevur heitið ”Kynsmunur í yvirlivilsi hjá lungnakrabbasjúklingum í Føroyum”. Kanningin fatar um lungnakrabbasjúklingar í árunum 2015-2020.

Í Føroyum liva menn við lungnakrabba styttri enn menn í hinum Norðurlondunum, og stórur munur er á kynunum. Tølini fyri, hvussu nógv liva fimm ár eftir at sjúkan varð staðfest, eru 12,7% fyri menn og 31,6% fyri kvinnur.

Niðurstøðan í kanningini er, at tað at lungnakrabbin er á so høgum stigi (so nógv framkomin) tá ið hann verður staðfestur, kann lýsa ógvisliga lágu tølini fyri, hvussu nógvir føroyskir menn við lungnakrabba liva. Ein onnur frágreiðing kann vera drúgva tíðin hjá monnum at fáa staðfest sjúkuna og byrja viðgerð borið saman við kvinnur. Kanningin vísir, at útgreiningin hjá monnum tók í miðal 46,9 dagar, borið saman við 27,2 dagar hjá kvinnum. Tíðin frá, at sjúkan varð staðfest til viðgerð var í miðal 28 dagar fyri menn og 22,7 dagar fyri kvinnur.

Greinin kann lesast her.

### UMRÁÐANDI AT KANNA FYRI LÍVMÓÐURHÁLSKRABBA

Hvørt ár fáa umleið tíggju kvinnur í Føroyum staðfest lívmóðurhálskrabba. Hóast vit hava koppseting fyri hetta slagið av krabbameini, er framvegis umráðandi, at kvinnur lata seg kanna fyri sjúkuna.

Tøl í Danmark vístu í fjør, at nógvar ungar kvinnur ikki taka av fyribyrgjandi kanningini. Ábendingar eru um, at støðan er tann sama hjá føroyskum kvinnum, segði Katrin Kallsberg, serlækni í kvinnusjúkum, í Góðan Morgun Føroyar 25. januar í fjør.

Orsøkirnar kunnu vera fleiri. Í Føroyum er kommunulæknatrot, og nógv hava ikki fastan kommunulækna, so kvinnurnar vita ikki, hvønn tær koma til. Fyri nógvar kvinnur er tað kensluligt at fara til hesa kanningina, sigur Katrin Kallsberg.



Allar gentur og kvinnur millum 12 og 28 ár kunnu lata seg koppseta fyri lívmóðurhálskrabba. Harafturat fáa kvinnur millum 25 og 60 ár boðið regluliga fyribyrgjandi kanning.

Tað er alneyðugt, at eisini koppsettar kvinnur taka av tilboðnum um fyribyrgjandi kanning fyri lívmóðurhálskrabba. Koppsetingin minkar um vandan fyri kyknubroytingum, sum kunnu vera undanstig til krabbamein, men hon verjir ikki fyri øllum sløgum av lívmóðurhálskrabba.

Útlitini at gerast frísk eru ómetaliga nógv betri, um tú staðfestir kyknubroytingar, áðrenn tað mennist til krabbamein, segði Katrin Kallsberg í sendingini. Sendingin kann hoyrast her.

## GÓÐ UNDIRTØKA FYRI HPV-KOPPSETING

Koppsetingin fyri HPV (Humant Papillomavirus), sum m.a. kann elva til lívmóðurhálskrabba, hevur góða undirtøku. Tøl frá Heilsutrygd vísa, at 95% av gentunum í Føroyum, sum eru føddar í 2010, eru koppsettar fyri HPV, og 53% av dreingjunum eru koppsettir.

HPV kann elva til kyknubroytingar, sum kunnu elva til krabba. HPV smittar við kynsligum sambandi og er rættiliga vanligt – serliga millum ung undir 30 ár. Í flestum førum berjir kroppurin ígerðina niður sjálvur, men hjá summum verður støðan varandi og kann í ringasta føri elva til krabbamein.

Mælt verður til, at bæði gentur og dreingir verða koppsett, tá ið tey eru 12 ár, t.e. áðrenn tey gerast kynsliga virkin og kunnu hava fingið HPV. Tað eru tvær koppsetingar, og koppsetingin er ókeypis fyri tey millum 12-17 ár. Tey, ið eru blivin 15 ár, tá ið tey fáa fyrstu HPV-koppsetingina, skulu hava tríggjar koppsetingar.

# AÐALFUNDUR

Mikudagin 19. apríl í 2023 hevði Krabbameinsfelagið aðalfund. Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali, Durita Tausen, forkvinna, og Anna Kristina Joensen, kassameistari. Báðar vórðu afturvaldar.

Nevndin skipaði seg soleiðis:

- Durita Tausen, forkvinna
- Magnus Magnussen, næstformaður
- Anna Kristina Joensen, kassameistari
- Olga Kristina Hansen, nevndarlimur
- Marnar Fríðheim Kristiansen, nevndarlimur

Tiltakslimir eru Martin Joensen og Elmar Ósá.



## EITT VIRKIÐ ÁR

Hvørt ár eru fleiri tiltøk fyri fólk, sum hava ella hava havt krabbamein og fyri avvarðandi. Árið í fjør var onki undantak. Skipað varð fyri fleiri skeiðum, fyrilestrum, samrøðubólkum, hugnaløtum, rørslutilboðum o.ø. Tey sjálvbodnu í Krabbameinsfelagnum hava verið sera virkin og hava skipað fyri nógvum tiltøkum. Nøkur tiltøk skipaði Krabbameinsfelagið fyri, og onnur skipaðu fyritøkur fyri.

## SAMRØÐUBÓLKAR

Krabbameinsfelagið hevði fleiri samrøðubólkar í fjør, har fólk kunnu hittast og tosa við onnur í somu støðu. Nakrir av samrøðubólkunum eru býttir upp eftir sjúku. Eisini var bólkur fyri tey, ið nýliga hava verið sjúk, og ein bólkur fyri foreldur, ið hava mist vaksin børn. Bæði fyrru og seinnu hálvu vóru samrøðubólkar fyri fólk, ið hava mist makan av krabbameini.

At hitta onnur í somu støðu, kann vera ein hjálp at fóta sær aftur. Í samrøðubólkinum er møguleiki at práta um og viðgera kenslur, tankar og trupulleikar. Tað eru sjúkrarøktarfrøðingar hjá Krabbameinsfelagnum sum leiða samrøðubólkarnar. Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava terapeutiska eftirútbúgving og drúgvar royndir at arbeiða við fólki í sorg og kreppu.

## SKEIÐ Í HÚÐRØKT OG MAKEUP

Í februar, apríl og oktober skipaði The Body Shop í SMS fyri ókeypis undirvísing í húðrøkt og makeup fyri kvinnur, ið eru í viðgerð fyri krabbamein. Hjá summum hevur viðgerðin við sær, at húðin broytist og gerst sartari, og tí er gott at vita, hvussu húðin skal røktast rætt. Ein løtt makeup kann fáa gerandisdagin at kennast lættari, tí tú kanst kenna teg frískari.

## VITAN UM BRÓSTKRABBA



Á hugnaløtu í mars hjá Bót til Bata greiddu Heidi Hvidbro og Súsan Joensen frá eini bróstkrabbaráðstevnu í Helsinki og nýggjastu vitanini viðvíkjandi bróstkrabba. Á hugnaløtu í september greiddi Linda Laksáfoss frá um brósthaldarar og protesur, og á tiltaki í oktober var møguleiki at hoyra Jónfríð Olsen, fysioterapeut og kandidat í fólkaheilsuvísindum, siga frá um týdningin at venja, tá ið ein hevur krabbamein.

## HUGNALØTUR

Undirlívsbólkurin skipaði í februar og oktober fyri hugnaløtu fyri kvinnur, ið hava ella hava havt krabbamein í undirlívinum. Á tiltakinum í februar greiddi Halda Hansen frá um at fáa staðfest krabbamein og um at fóta sær aftur.

Eisini Móðurmerkjabólkurin hevur havt tiltak, har tey, ið hava ella hava havt móðurmerkjakrabba, komu saman til hugna og prát. Og í september hevði Lipp- og lymfødembólkurin tiltak, har millum annað varð greitt frá eini altjóða lipp- og lymfødemráðstevnu í Nottingham fyrr um summarið.

Foreldrabólkurin at børnum við krabbameini skipaði fyri sosialum tiltøkum fyri familjurnar, m.a. skipaði bólkurin fyri árliga jólahugnanum, har fleiri familjur komu saman til spæl, prát og hugna. Fyri familjurnar hevur tað nógv at týða at koma saman, hugna sær og hitta onnur í somu støðu.

## TILTØK UM PROSTATAKRABBA

Tá ið ein maður hevur fingið prostatakrabba, broytist lívið. Ikki bara hjá honum, men eisini hjá makanum. Í mars var fyrilestur fyri makar hjá monnum við prostatakrabba. Greitt varð frá, hvussu sjúkan ávirkar mannin, og hvønn týdning tað hevur fyri parlagið. Fyrilestrahaldarar vóru Birgitte Schantz Laursen og Anette Højer Mikkelsen, sjúkrarøktarfrøðingar og kliniskir sexologar á Aalborg sjúkrahúsi. Tær eru eisini konsulentar á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Í november var tiltak fyri menn, sum hava ella hava havt prostatakrabba. Johan Poulsen, serlækni í urologi á Aalborg Universitetshospitali, greiddi frá tí, sum rørir seg viðvíkjandi prostataviðgerð, og hvat nýggi skannarin, sum skal setast upp á Klaksvíkar sjúkrahúsi, kann brúkast til viðvíkjandi prostatakrabba.

## GONGUTÚRUR

17. august skipaði Krabbameinsfelagið fyri gongutúri niðan á Kongavarðar fyri fólk, sum hava ella hava havt krabbamein og teirra avvarðandi. Eftir túrin var drekkamunnur í hølunum hjá felagnum á Grønlandsvegi 58.

### STERKARI VIÐ RØRSLU

Styrkivenjing og rørsla hava nógv at týða, bæði kropsliga og sálarliga. Tær bøta um útlitini at gerast frísk/ur og geva samstundis styrki at standa ímóti hørðu viðgerðini. Bæði í Tórshavn og Suðuroy hevur Krabbameinsfelagið á vári og um heystið ókeypis rørslutilboð til krabbameinssjúklingar og avvarðandi. Venjingin í Tórshavn er í fimleikahøllini í Sankta Frans skúla, og í Suðuroy á fysiurgisku deild á Suðuroyar sjúkrahúsi. Krabbameinsfelagið hevur havt venjingar í Klaksvík og í Vágum í fleiri ár, men í fjør vóru ongar, tí tað eydnaðist ikki at fáa venjarar.

### HUGNI Á TVØROYRI

Á Tvøroyri hava krabbameinssjúklingar havt møguleika at hittast ein hósdag um mánaðin í gomlu Roykstovuni miðskeiðis á Tvøroyri til hugna og prát. Tað er stuðulsbólkurin hjá Krabbameinsfelagnum við sjálvbodnum fólki í Suðuroy, sum skipar fyri.

### TEMADAGUR FYRI SJÁLVBOÐIN

Ein stór styrki hjá Krabbameinsfelagnum er tann stóri hópurin av sjálvbodnum, sum á ymsan hátt er virkin í felagnum. Tann 16. november skipaði Krabbameinsfelagið fyri temadegi á Hotel Føroyum fyri teimum sjálvbodnu.

Á tiltakinum hevði Bergtóra Høgnadóttir, HR-mennari og master í positivari sálarfrøði, fyrilestur um, hvussu ein kann varðveita áhugan at virka sum sjálvboðin, og hvussu ein kann brenna fyri nøkrum uttan at brenna út. Umráðandi er at vera tilvitað/ur um eginumsorgan og at løða síni egnu battarí, tá ið ein skal geva øðrum umsorgan.

Umframt fyrilesturin hjá Bergtóru Høgnadóttir var framløga um Krabbameinsfelagið og nýggjastu hagtølini fyri krabbamein.

### BØKUR

Í fjør komu tvær áhugaverdar bøkur út, sum eru viðkomandi fyri krabbameinsøkið.



Onnur er ein ævisøga um Sannu Dahl (1915-2011), sum var fyrsti føroyski røntgenlækni og ein av teimum, sum stovnaði Krabbameinsfelagið. Bókin hevur heitið ”Sanna Dahl – Læknin ein og hundraðtals hermenn”. Høvundarnir eru feðgarnir, Martin og Flóvin Þór Nygaard Næs.

Hin bókin er ungdómsskaldsøgan ”Stormens vuggevise”, sum føroyska Barbara Beatrice Davidsen hevur skrivað. Skaldsøgan, sum er ætlað ungum frá 12 ár og uppeftir, snýr seg um tvær vinkonur, har onnur verður rakt av krabbameini. Bókin lýsir, hvussu lívshóttandi sjúkan ávirkar vinalagið.

## INNSAVNING

Krabbameinsfelagið fær ikki almennan stuðul, og fíggjarliga grundarlagið undir felagnum er limagjald og gávur. Hetta er m.a. stuðul frá privatfólki, fyritøkum og í sambandi við jarðarferðir.

Harumframt fær Krabbameinsfelagið pening frá innsavningum. Hetta er Krabbameinsfelagið so ómetaliga takksamt fyri. Hvør einasta króna, sum kemur inn, ger mun í stríðnum móti krabbameini og í umsorganini fyri teimum, ið rakt verða. Krabbabeinsfelagið takkar av hjarta øllum stuðlum. Hjálpin ger, at felagið røkkur so víða, sum tað gera.

## GRANNAKAFFI

Vikuskiftið 17.-19. mars varð skipað fyri Grannakaffi, sum er árliga innsavningin hjá Krabbameinsfelagnum. Grannakaffi varpar ljós á krabbamein, umframt at fólk standa saman um felagið.

Fleiri ymiskir hættir eru at hava Grannakaffi, t.d. at bjóða grannum til kaffi og hava eina bússu standandi, sum kaffigestirnir kunnu lata pening í. Eisini ber til at taka bússuna við til arbeiðis, í skúla, skipa fyri loppumarknaði ella ganga í grannalagnum við bússuni. Í fjør komu 181.335,62 krónur inn.

## LJÓSAREYÐUR OKTOBER



Allan oktober varpaði Bót til Bata ljós á bróstkrabba undir átakinum "Ljósareyður oktober". Fleiri ferðir áður hevur Bót til Bata varpað ljós á bróstkrabba í samstarvi við føroyskan sniðgeva, ið hevur sniðgivið ein bróstkrabbalut. Í fjør var samstarvað við EINSTAKT, sum sniðgav sokkar og blusur at selja. Ljósareyður oktobur gav í fjør 77.336,25 krónur.

## FØROYA VAKRASTA 1/2 MARATON

Frælsi, sum er felagið fyri frælsan ítrótt í Vágum, stuðlar eisini Krabbameinsfelagnum í sambandi við tilmeldingina til Føroya vakrasta 1/2 maraton. Í 2023 gav henda innsavningin 52.350 krónur.

## SPYR.FO

Samstarvið millum Spyr.fo og Krabbameinsfelagið útvegar eisini inntøkur. Spyr.fo er ein spurnartænasta, sum á fartelefonini ger spurnakanningar millum føroyingar. Fyri hvønn luttakara letur tann, sum ger kanningina, fýra krónur til Krabbameinsfelagið. Í fjør var stuðulin frá Spyr.fo 64.560 krónur.

## TEAM RYNKEBY FØROYAR GRUNNURIN

Í nógv ár hevur Team Rynkeby Føroyar savnað inn pening til góðgerandi endamál. Leygardagin 9. september varð stuðulin fyri 2023 handaður Team Rynkeby Føroyar Grunninum á samkomu í Gulu Smiðju í Saltangará. Upphæddin var 1.715.000 krónur, og tað er met.

Stuðulin fer í ein grunn, sum Krabbameinsfelagið umsitur fyri Team Rynkeby Føroyar. Grunnurin stuðlar familjum, ið hava børn við lívshættisligari sjúku, umframt at grunnurin stuðlar at granska sjúkurnar hjá hesum hjá børnum. Eisini fáa Berin og Sinnisbati part av stuðlinum frá Team Rynkeby Føroyar. Børnecancerfonden, sum hjálpir føroyskum børnum, ið mugu til Danmarkar í viðgerð, fær eisini av stuðlinum.